# Í HB fara tey at halda við B36

*Sumbingar seta øll segl til í royndini fjórða árið á rað at vinna rættin til 1. deildarfótbólt*



*Ein partur av avgerini um FM fellur í Sumba, har HB vitjar niðurflytingarhótta heimaliðið*

Vónbrotið hjá HB spælarunum var eyðsýnt, tá B36 í evstu løtu sunnudagin hevði javnað til 2–2. Áskoðararnir sótu sum slignir á nevið, og sambært formanninum í HB, var talan um kollektivt vónbrot:

– Vit kendu tað, sum um møguleikin at vinna meistaraskapin hvarv. Nú er ein lítil vika farin. Vit kunnu framvegis gerast meistarar, men so verður tað, tí VB søplar sín møguleika burtur, samstundis sum vit vinna í Sumba. Hetta seinna kann HB gera nakað við. Hitt fyrra er treytað av, hvussu B36 stendur seg. Tað kemur ikki so ofta fyri, men í dag fara tey í HB húsinum at taka á við B36.

Tað er Gunnar Mohr, formaður í HB, sum sigur hetta. Hann fer ikki til Sumbiar, tí hann skal til Fuglafirðar at hjálpa til at tryggja næstbesta liðnum framhaldandi tilveru í 2. deild.

– Tey seinnu árini hevur tað verið vanligt, at HB húsið hevur verið opið tað kvøldið, tá fótbóltskappingin endar. Soleiðis verður tað eisini í leygarkvøldið. Sjálvandi verður tað serliga hugaligt, um okkara menn koma úr Sumba við meistaraskapinum, men tað plagar at vera hugnaligt, eisini tá okkara lið er endað á fjórða plássinum. Vit vita, at tað í hvussu so er verður silvur í ár, og so kunnu vit ikki annað enn vóna, at tað verður meiri enn tað, sigur Gunnar Mohr.

Hjá HB eru tveir av føstu monnunum leikbannaðir. Teir eru Jóhannis Joensen og Rúni Nolsøe.

**Allir tøkir**

Sumbingar stríðast fyri at fáa rættin til 1. deildarfótbólt fjórða árið á rað. Skal tað eydnast, er tað neyðugt at fáa stig ímóti HB. Um FS Vágar einki fær frá KÍ, verður javnleikur nóg mikið hjá sumbingum, sum harvið gerast javnir í stigum við FSV, men teir enda hægri á støðutalvuni, tí Sumba hevur vunnið báðar innanhýsis dystirnar ímóti FSV.

Allir sumbingarnir, sum hava spælt seinastu tíðina, eru tøkir. Dánial Johan Joensen kemur heim úr Danmark til dystin. Tað er ikki greitt enn, men tað kann væl hugsast, at dysturin verður tann síðsti í Sumba hjá onkrum av teimum fýra útlendingunum, sum í ár hava spælt har suðuri.

– Vit hava tað álit á okkara monnum, at teir fara at gera sítt ítarsta. Teir vita, og teir hava víst fleiri ferðir, at teir eru betri, enn stórtapið í Runavík síðsta sunnudag kundi bent á. Uttan mun til, hvat endastøðan verður, so skal kappingarárið rundast av á rættan hátt, sigur formaðurin hjá sumbingum, Jonhard Vestergaard.

JH

**Støðan, 1. deild menn**

| | | dystir | v | j | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VB | 17 | 11 | 4 | 2 | 38 | 21 | 17 | 37 |
| 2 | HB | 17 | 10 | 5 | 2 | 37 | 20 | 17 | 35 |
| 3 | B68 | 17 | 10 | 1 | 6 | 40 | 31 | 9 | 31 |
| 4 | B36 | 17 | 9 | 1 | 7 | 48 | 25 | 23 | 28 |
| 5 | NSÍ | 17 | 8 | 3 | 6 | 41 | 28 | 13 | 27 |
| 6 | KÍ | 17 | 8 | 3 | 6 | 37 | 24 | 13 | 27 |
| 7 | GÍ | 17 | 7 | 2 | 8 | 34 | 35 | -1 | 23 |
| 8 | B71 | 17 | 4 | 2 | 11 | 24 | 31 | -7 | 14 |
| 9 | FS Vágar | 17 | 3 | 2 | 12 | 18 | 49 | -31 | 11 |
| 10 | Sumba | 17 | 3 | 1 | 13 | 15 | 68 | -53 | 10 |



*Jákup á Borg ivast ikki í, at B36 leikararnir fara at gera sítt til at herða um gullstríðið*

# B36 ætlar at vinna

*Ikki er líkt til, at VB'arnir hava eina lætta uppgávu fyri framman, nú avgerðin um FM skal fella*

JÁKUP MØRK

Nógvar røddir hava seinastu vikuna verið frammi um, at ivaleyst fór B36 ikki at gera ov nógv burtur úr dystinum móti VB. Ein sigur móti VB kann væl viðføra, at gullkrónurnar enda hjá grannunum úr HB.

**Taka sær ikki av løttum**

At meta eftir tí, sum leikararnir siga, er tó einki um hetta prátið. B36 hevur framvegis møguleika at røkka bronsuplássinum og harvið Europa komandi ár.

- Vit fara á vøllin fyri at vinna, tað er so eingin ivi um tað, heldur Jákup á Borg, sum hóast unga aldurin telist millum mest royndu leikararnar á B36 liðnum. — At fara út á vøllin fyri at tapa, haldi eg slettis ikki at man kann loyva sær, sigur hann víðari.

- Tað hevði eisini verið stuttligt, um man eftir dystin kundi fingið nøkur klapp frá HB áskoðarunum, sum kanska eisini fara at stuðla okkum undir sjálvum dystinum.

**Mikkjal er úti**

Hjá B36 eru so at siga allir mans tøkir. Mikkjal Thomassen hevur leikbann, men sum skilst, hevði hann helst ikki verið tøkur kortini. Miðvallarin, sum eisini hevur verið verjuleikari í ár, meiddi seg nevnliga undir venjing hóskvøldið.

Og Jákup leggur eisini dent á, at tað verður sterkasta lið teirra, sum fer á vøllin, so skulu vágbingar vinna FM, mugu teir sjálvir koma at taka tað. Í øllum førum er ikki líkt til, at teir kunnu taka nakað fyri givið leygardagin.

**Dystir um vikuskiftið**

**1. deild**

| | | |
|---|---|---|
| 30.09 | FS Vágar-KÍ | Petur Hansen |
| 30.09 | B68-GÍ | Lassin Isaksen |
| 30.09 | B36-VB | Suni Johansen |
| 30.09 | Sumba-HB | Niklas á Líðarenda |
| 30.09 | B71-NSÍ | Regin Egholm |

**2. deild**

| | | |
|---|---|---|
| 30.09 | TB-Royn | Sjúrður Norðbúð |
| 30.09 | GÍ-KÍ | Tommy O. Joensen |
| 30.09 | B36-LÍF | Lars Müller |
| 30.09 | ÍF-HB | Jákup M. Kjeld |
| 30.09 | NSÍ-EB/Streymur | Eiler Rasmussen |



# Hava longu rokkið málinum

*Hóast vón um gull og heiður, so heldur VB venjarin ikki, at nakað trýst liggur á hansara leikarum*




*VB venjarin sigur, at líka mikið hvussu dysturin í dag endar, so eiga vágbingar at vera nøgdir um avrikið hjá teirra liði í ár*

JÁKUP MØRK

Seinast VB var á odda í landskappingini, undan dystinum móti NSÍ í Runavík, tóktist tað sum hetta nervaði liðið.

Ta ferðina var líkt til, at leikararnir vóru tyngdir av nervum, men sambært venjaranum, Krsystof Popzynski, eru nervarnir ikki so nógvir í dag.

- Undan dystunum móti GÍ og B68 stóð nógv á hjá mær, men nú haldi eg bari, at vit allir gleða okkum til dystin.

**Meira enn vænta**

Orsøkina til hetta sigur venjarin vera, at undan kappingarárinum var tað eingin, sum roknaði við, at VB skuldi gera tær stóru skreytirnar.

- Tá høvdu ivaleyst øll verið glað, um vit høvdu vunnið silvurmerkini. Í dag hava vit tryggjað okkum silvurmerkini, men nú vilja øll hava meiræ. Hetta er eisini náttúrligt, men eftir mínari fatan, kunnu vit fara púra frígjørdir inn á vøllin, tí vit hava eftir mínari fatan einki at tapa. Vit hava longu nátt meira, enn nakar hevði droymt um.

- Hetta merkir tó ikki, at vit ikki fara eftir gullinum. Vit fara altíð á vøllin eftir trimum stigum, og soleiðis verður eisini í morgin. Møguleikin fyri gullinum er eisini betri, enn hann nakrantíð hevur verið, og sjálvsagt eru øll sera spent, um vit megna at taka av hesum møguleikanum. Fótbóltur er tó einaferð soleiðis, at um hitt liðið er betri, so gerst ikki við.

**Allir tøkir**

Til stóru uppgávuna, sum kanska er týdningarmesti dystur í søgu felagsins, hevur venjarin allar sínar mans tøkar.

- Vit hava ongar skaðar og eingi leikbann, so hópurin er 100% til reiðar. Uppgávan hjá mær verður so at seta sterkasta liðið saman, og so mugu vit síggja, hvussu langt hetta ber, sigur fryntligi venjarin at enda.

Sostatt tykist venjarin hjá VB at vera nógv róligari undan dystinum, enn flestu viðhaldsfólk felagsins eru. Um hetta er ein roynd at minka um trýstið á spælararnar ella ikki, skal ikki verða gitt um, men stndure tað til mótstøðuleikararnar, eigur VB at taka dystin í størsta álvara.

# GÍ hevur hagtølini í sínum parti

*B68, sum ætlar sær Intertoto plássið, hevur ikki vunnið á heimavølli ímóti GÍ síðani í 1989*

Tað verður oyggjauppgerð á Svangaskarði seinnapartin. Toftamenn taka ímóti gøtumonnum, sum ongan møguleika hava at blanda seg í stríðið um heiðursmerkini, og sum ikki eru í vanda fyri at koma í holtur við niðurflytingina.

Um hagtølini skulu takast sum ábending, so er GÍ favorittur. Gøtumenn hava nógvu tey seinnu árini havt sera gott tak á B68. Síðani besta deildin í 1988 varð víðkað til tíggju lið og til og við 1999 kappingarárinum, hava GÍ og B68 spælt 24 landskappingardystir. GÍ hevur vunnið trettan ferðir, B68 hevur vunnið fimm ferðir, og sjey ferðir hevur tað verið janvleikur. GÍ hevur skorað 50 mál, og B68 hevur skorað 26 mál.

Serliga merkisvert er tað, hvussu striltið tað hevur skorist hjá B68 á heimavøllinum á Svangaskarði. Har hevur B68 ikki fingið øll stigini ímóti GÍ síðani í 1989, tá úrslitið var 1–0.

Toftamenn kunnu hefta seg við, at teir undan summarsteðginum vunnu 2–1 í Gøtu.

– Vit høvdu vónað at sleppa upp í part í Europa Cup. Tað miseydnaðist. Síðsti møguleikin fyri altjóða fótbólti er Intertoto Cup. Hetta kastar ikki pengar av sær til felagið, men tað er altíð hugaligt hjá spælarunum at hava møguleikan at sleppa út um landoddarnar at royna seg, heldur Niclas Davidsen, formaður í Tofta Ítróttarfelag.

Hjá B68 er Jan Petersen framvegis skaddur. Fróði Benjaminsen var leikbannaður í Vági. Nú er hann tøkur aftur.

**Síðsti dysturin**

Gøtumenn siga seg vera uppsettar. Sigurin í steypakappingini bjargaði teimum pláss í UEFA Cup komandi kappingarár. Tað er greitt, at í landskappingini er og verður GÍ nummar sjey, men teir siga seg ætla at leggja nógv fyri á Toftum. Magni Jarnskor var leikbannaður, tá vágamenn sunnudagin vórðu avsmurdir í Sarpigerði, hann er tøkur aftur. Teir eru tøkir aftur, og tað eru allir hinir spælararnir eisini. Tað tykist vera greitt, at Súni Olsen í dag fer at umboða barndómsfelagið fyri síðstu ferð í hesum umfarinum. Harafturat er tað ikki ómøguligt, at Henning Jarnskor komandi ár fer at royna seg í Odense. Men hetta er ikki heilt greitt enn.




Møguliga er talan um seinasta dystin hjá Henningi í GÍ-troyggjuni

JH



*Í seinnu kappingarhálvu er tað bara VB, sum hevur havt betri úrtøku enn runavíkingar*

# Bæði vilja hava heiðurligan enda

*Felags fyri B71 og NSÍ er, at hvørki hevur nakað at spæla fyri. Tó ætla tey ikki at taka sær av løttum, men fara at kempa fyri einum heiðurligum enda eftir eitt kappingarár, sum ikki hevur gingið eftir vild*

STEFAN Í SKORINI

Bæði liðini eru hampuliga væl fyri undan seinasta dystinum. Einki stórt mannfall er í teimum báðum legunum.

Danin Micheal Jørgensen verður eftir øllum at døma ikki tøkur hjá venjaranum Per Langvad. Michael Jørgensen hevur mest verið í álopinum hjá sandoyingum. Í Klaksvík seinasta vikuskiftið hitaði hann upp, men gav síðani boð um, at hann ikki var klárur at spæla vegna skaða. Ikki er væntandi, at Micheal er sloppin av við skaðan leygardagin. Venjarin skal heldur ikki rokna við, at miðvallarin Iulian Florescu verður klárur. Hann var heldur ikki við í Klaksvík. Annars er eingin annar skaddur, og eingi leikbann eru í hópinum.

Eli Hentze hjá B71 heldur, at liðið ikki hevur spælt nóg væl, um hugt verður eftir spælarunum. Teir burdu eftir hansara tykki havt fleiri stig at vísa á við kappingarlok. B71 hevur ikki havt smálutirnar við sær. Sjey ferðir hevur liðið tapt við einum máli. Tey bestu úrslitini hjá teimum í ár hava verið sigrar ímóti VB og B36 á útivølli.

NSÍ hevur fingið næstflest stig í seinnu hálvu. Seks stig eru farin fyri skeytið, tá runavíkingar tvær ferðir eru farnir av vøllinum sum taparar. Bara VB, sum hevur mist fimm stig, hevur betri úrtøku í seinnu hálvu. Runavíkingar iðra seg um tey tólv stigini, liðið misti í fyrru hálvu. Allir spælarar eru skaðafríir, men Ian Højgaard er leikbannaður, tí hann fekk sítt triðja gula kort í stórsigrinum móti Sumba. Annars eru eini fimm spælarar hjá NSÍ, sum í fleiri vikur hava ligið á markinum, og teimum vantar bara eitt gult kort fyri at verða leikbannaðir. Teir flestu hava tó hórað undan.

Seinast liðini møttust endaði tað við javnleiki 1-1 á eystanstevnu. Støðan er tann, at NSÍ ikki kann røkka einum heiðursmerki, meðan B71 í veruleikanum ikki kann flyta niður. Trý stig eru niður til FS Vágar, men vágamenn skulu vinna við eini 24 málum ímóti KÍ, um teir skulu leggja sandoyingar afturum seg. Bæði liðini kunnu tí fara á vøllin uttan at hugsa um, hvussu leikur ferst aðrastaðni.